










# Hvør taska hevur sína søgu

– Eg seymi bert taskur úr gomlum toyi og klæðum, sum eg endurnýti, og tað ger, at hvør einasta taska fær sína heilt serligu søgu, sigur Anna Kristin Bæk, sum á áttanda ári seymar sínar heilt serligu og eyðkendu taskur. Taskurnar hava gingið sum heitt breyð bæði í Føroyum og í Danmark, og Kristin hevur júst latið várkollektiónina 2008' úr hondum

"Risastóri, grøni filtfrakkin hjá vinkonu ommu mína, brúnt lambsskin og gylti cardigan'urin hjá mammu". Hetta er søgan um tilfarið til eina av mongu taskunum, sum Kristin Bæk hevur seymað. Nógvar av taskunum eru seldar her heima, men eisini í Danmark hevur Kristin selt taskur í hópatali.

-Eg eri ein savnari, og tað havi eg altíð verið. Eg síggi ofta møguleikar, har onnur bert síggja burturkast. Tá eg til dømis fari niður í ein gamlan kjallara, finni eg ofta okkurt gamalt toy, sum eg síggi møguleikar í, og sum eg bara má eiga, greiðir Kristin Bæk frá.

Hon er útbúgvin sniðgevi frá Columbine-skúlanum í Keypmannahavn, men er tó serliga kend fyri at seyma búnar til sjónleikir. Hvør minnist ikki ótrúliga vakra dreymakotið hjá Jósefi, sum var seymað úr slipsum? Og Kristin hevur millum annað eisini staðið fyri búnunum til Fame og Pipar og Salt, eins og hon hevur seymað búnar til eitt ótal av donskum leikum.

Men alsamt fleiri kenna eisini Kristin Bæk fyri hennara heilt serligu unika taskur.

**Stórur eftirspurningur**

"AnnaBaek", sum hennara sniðgevaranavn er, hevur altíð seymað nógv. Hon var blaðung, tá hon byrjaði at seyma leikbúnar og søkti tí inn á kenda Columbine-sniðgevaraskúlan í Keypmannahavn. Nú arbeiðir hon hjá einum skraddara á "Stroynum", og undan tí hevði hon fast arbeiði á "Husets Teater", har hon seymaði leikbúnar. Hon hevur sostatt altíð havt úr at gera við seymingini, og taskurnar hava bert verið frítíðarítriv.

-Eg haldi, at eg seymaði tær fyrstu taskurnar í 2000. Tað komu beinanvegin nógvar viðmerkingar um taskurnar, og eg varnaðist, at hetta veruliga var nakað, sum fólk vóru áhugað í. So eg havi stútt og støðugt hildið á at seymað mínar taskur, og tær verða stútt og støðugt seldar, so tað er ógvuliga stuttligt, heldur Kristin.

Í fyrstuni seldi hon taskurnar á ymsum framsýningum og á fleiri sonevndum "design-bazaarum", sum verða hildnir nakrar ferðir árliga í Keypmannahavn, og har sniðgevar kunnu selja síni ting.

Men so við og við fekk Kristin eisini fótin inn um ymsar viðurkendar handlar í Danmark, sum fegnir vildu selja hennara serligu og kitch'utu taskur. Í Føroyum er tað Beinta Vilhelmsen, skraddari, sum hevur staðið fyri søluni. Og í heilum ringja tey til Kristin eftir fleiri taskum, so hvørt sum tær verða útseldar.

**Endurnýtsla**

Kristin greiðir frá, at um tað mundið, tá hon seymaði tær fyrstu taskurnar, var tað ógvuliga "inn", at alt skuldi endurnýtast og hava eina søgu. Og av tí, at hennara taskur allar vóru seymaðar av endurnýtslu-toyi, var lagamanni hjá henni at greiða frá upprunanum. Og hvør einasta taska hevur eisini eina nágreiniliga frágreiðing um, hvaðani toyið stavar.

- Eftirsum eg eri útbúgvin í mótavinnuni, veit eg, at tað er ein sera "grunnur" heimur. Tí er tað stuttligt at kunna vísa á eina søgu og ein uppruna. Nógv av tilfarinum havi eg eisini fingið frá ymsum fólkum uppá ymsar løgnar mátar, so søgan verður stuttlig. Harumframt seti eg mynstur saman, akkurát sum eg havi hug til, og tað skapar nakrar øðrvísi og tíðarleysar taskur, sum ikki eru bundnar at nøkrum ávísum trendi. Tað haldi eg, at fólki dámar, vísir Kristin á.

- Besti mátin at lýsa taskurnar er kanska at siga, at tær eru "klikkaðar", tí tær ikki hava nakran ávísan stíl. Og tað er helst lættari hjá fólki, sum vanliga lata